## RK-Prix byrjað

Fyrsta umfar av ársins RK-Prix, sum er innanhýsis kapping hjá róðrarfelagnum Knørri, var á Saltsøluni sunnudagin, har uppmøtingin var góð og allir bólkar umboðaðir. Vinnarar hjá U15 vóru Anna Louisa Rubek Nielsen og Snorri S. Arge, hjá U18 Gunnvá Fossaberg Ellingsgaard og Hallur Nattestad, og hjá teimum vaksnu vunnu Kári Rubek Nielsen og Johanna Petersen. Næsta umfar av kappingini verður 22. november, somu tíð og sama stað.



## Broytt kapping

Nakrar broytingar eru gjørdar í RK-Prix, ið skulu gera hvørt umfar rættvísari og styttri. Millum annað er stytt munandi um steðgin millum ymsu bólkarnar, so kappingin tekur bara ein góðan tíma tilsamans. Onnur broyting er eisini hon, at í ár verður bert róð eftir korrigeraðari tíð, sum merkir, at tíðin hjá hvørjum rógvara verður mett í mun til vektina hjá honum. Á henda hátt fáa vit eitt rættvísari úrslit, har tey léttaru hava sama kjans sum tey tyngru.




**Liverpool-leikarin, Fabio Aurelio, beinir burtur ein av teimum mongu baðibóltunum, ið Manchester United-viðhaldsfólk tveittu inn á vøllin á Anfield sunnudagin**

Mynd: PA/Polfoto